

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 11 - 2012

# Løgmaður - Føroyska veðurlagið gull vert

Veðurlagið í Føroyum kann ofta tykjast strævið, summi vilja siga beinleiðis ófantaligt til tíðir. Tað er tó júst okkara veðurlag, sum er ein risa varandi orkukelda, og Føroyar eru væl egnaðar til at framleiða vindorku, segði ein vælupplagdur og fegin Kaj Leo Holm Johannessen, løgmaður m.a., tá hann tendraði tær fimm nýggju vindmyllurnar hjá SEV í Neshaga í Eysturoynni fyrrapartin. Ikki færri enn 150 fólk vóru við til hesa søguligu samkomu í kjallaranum á Fríðrikskirkjuni á Nesi. Har vóru umboð fyri SEV, Jarðfeingi, týsku orkufyritøkuna Enercon, fyri kommunurnar, løgtingsfólk, landsstýrisfólk og mong onnur. Tað var eingin mætari enn sjálvur løgmaður, ið fekk heiðurin at seta tær nýggju vindmyllurnar til netið hjá SEV. Eftir samkomuna varð farið út í Neshaga at síggja vindmyllurnar, sum mugu sigast at vera ein slóðbrótandi íløga í Føroya framtíð. Tær fara at framleiða streym, sum svarar til elnýtsluna hjá 3.500 sethúsum og hava við sær eina sparing í oljunýtsluni hjá SEV uppá 17 mill. kr. um árið. Týska fyritøkan Enercon, sum hevur gjørt vindmyllurnar, tykist eftir øllum at døma at síggja nakað heilt stórt og spennandi í føroysku verkætlanini og longu nú vísir royndarkoyringin, at av teimum 20.200 vindmyllunum, sum fyritøkan hevur sett upp kring heimin, framleiða vindmyllurnar í Føroyum uppá seg mestu orkuna. Løgmaður segði í røðu síni ma. - Vit munnu flest øll kenna orðini hjá Heðini Brú um, at vit búgva ikki í Føroyum av praktiskum orsøkum. Og so er. Náttúran er hørð og lívskorini hava ofta verið, og eru enn, tíðum truplum. Tó hava vit megnað at vunnið á teimum torføru umstøðunum og hava bygt eitt ríkt og framkomið samfelag á okkara oyggjum. Orka er ein grundleggjandi fyritreyt undir einum framkomnum samfelag. Seinastu 100 árini hava fyrst kommunurnar, og síðan 1946 SEV, útbygt el-kervið og harvið lagt lunnar undir nútíðargerðini av føroyska samfelagnum. Hóast SEV hevur mong ár á baki, er felagið framvegis

virkisfúst og framsøkið sum ongantíð áður. Í dag verður enn ein varði lagdur á leiðini hjá SEV. Tí hesar nýggju vindmyllurnar eru eitt frambrot. Vindmyllurnar hóska serliga væl til føroysk viðurskifti. Tær kunnu framleiða streym í nógv størri vindstyrki enn fyrru myllurnar. Og við hesum myllum fer framleiðsla av streymi úr vindi væntandi at økjast við eini helvt. Veðurlagið í Føroyum kann ofta tykjast strævið, summi vilja siga beinleiðis ófantaligt til tíðir. Tað er tó júst okkara veðurlag, sum er ein risa varandi orkukelda, og Føroyar eru væl egnaðar til at framleiða vindorku. Mær er fortalt, at ein vindmylla í Føroyum framleiðir umleið 50 prosent meira enn ein vindmylla, sum stendur á landi í Danmark. Og ein vindmylla í Føroyum framleiðir nærum tað sama, sum ein havvindmylla. Tó til munandi lægri kostnað. Føroyar standa eins og øll heimsins lond fyri stórum avbjóðingum á orkuøkinum. Vit eru í stóran mun bundin av oljunýtslu, og er hetta ein byrða - bæði fyri umhvørvið og búskapin. Neyðugt er at taka stig  stór stig  móti at gera Føroyar til ein reinorkubúskap. Landsstýrið hevur sett sær sum mál, at í 2020 skulu meira enn 80 prosent av orkunýtsluni á landi stava frá varandi orkukeldum. Hesar vindmyllur eru eitt týdningarmikið stig á leiðini. Og aðrar spennandi verkætlanir liggja fyri framman. Í gjár var, sum kunnugt, royndarverkætlanin við Power Hub skipanini sett í verk. Talan er um nýggja tøkni, sum kann økja um møguleikan at gagnnýta óstøðugu vindorkuna. SEV arbeiðir við eini verkætlan um eina vindmyllulund. Gerst henda lund veruleiki, verður streymframleiðslan úr vindi fleirfaldað. So eg eri sera spentur uppá, hvussu nýggju vindmyllurnar og hinar verkætlaninar fara at roynast. Landsstýrið, SEV og kommunufeløgini eru eisini farin undir eina umfatandi greining av, hvussu vit kunnu røkka málinum um ein reinorkubúskap. Arbeiðið verður liðugt til várs. Eg gleði meg til at síggja úrslitið, og at partarnir fara at seta seg saman at viðgera, hvussu vit fremja tær neyðugu útbyggingarnar fyri at røkka málinum. Eg vil at enda ynskja tykkum í SEV tillukku við hesum vindmyllum. Og nú vit tosa um vindorku, er gott høvi at bera tykkum heilsanina, sum føroyingar so mangan hava borið hvørjum øðrum, og tað er at ynskja tykkum - Góðan byr! Takk fyri. Myndir Løgmaður trýstur á knøttin. Kaj Leo Holm Johannessen, løgmaður, Johan Dahl, orkumálaráðharri og Finn Jacobsen, tekniskur sjtóri hjá SEV í Neshaga í morgun. Stýrislimir í SEV saman við SEV stjóranum Terje Nielsen, verkætlanarleiðari hjá SEV, saman við SEV stjóranum Hákun Djurhuus og umboðsmanninum hjá týsku vindmylnufyritøkuni Enercon. Tær fimm vindmyllurnar í Neshaga Løgtingskvinnan og fyrrv. vinnumálaráðharrin Bjørt Samuelsen og SEV nevndarformaðurin, Jákup Sune Lauritsen vóru fegin um tann nógva vindin Sí eisini komandi myndafrásøgn frá stóru hendingini í morgun. Myndir - oljan.fo/Jan Müller